# Helena kom ikki á javnaðarlistan

**Á eykauppstillingarfundi hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag í mikukvøldið varð endaliga avgjørt, at Helena Dam á Neystabø ikki stillar upp fyri Javnaðarflokkin til løgtingsvalið komandi**

UPPSTILLING
*Eirikur Lindenskov*

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag hevði eykauppstillingarfund mikukvøldið, har eitt nýtt umboð skuldi veljast á í staðin fyri Katrina Gaard, sum hevði trekt seg av listanum.

Á uppstillingarfundinum fyri tveimum vikum síðani varð Helena Dam á Neystabø eitt av fýra uppskotum, sum ikki komu á listan. Tí var ein ávísur spenningur, um hon fór at verða vald á listan hesaferð, nú hon aftur var í uppskoti.

Katrin Gaard var vald á listan sum umboð fyri Sosialistiskt Ungmannafelag, sum sambært siðvenju hevur eitt umboð á listanum. Felagið hevði tí skotið upp at velja Bartal Nolsøe Poulsen á listan, og sostatt var lagt upp til stríðsval teirra millum.

Tá avtornaði dróg Bartal Nolsøe Poulsen longra stráið, og er tað tí endaliga avgjørt, at Helena Dam á Neystabø ikki verður valevni Javnaðarfloksins til hetta valið.

Helena Dam á Neystabø segði við Sosialin fyri tveimum vikum síðani, at hon ikki fór at stilla upp fyri annan flokk, og at hon ikki fer at stilla upp í øðrum valdømi.

Út frá hesum kann so staðfestast, at Helena Dam á Neystabø fer úr politikki – í øllum førum fyribils – á komandi løgtingsvali, sum verður í seinasta lagi 30. apríl

Listin hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag sær soleiðis út:

Tummas Arabo, Signabøur
Bergur Dam, Varðagøta 53 Tórshavn
Eyðolv Dimon, Marinargøta 3, Hoyvík
Katrin D. Jakobsen, Villingardalsvegur 61, Tórshavn
Elin Lindenskov, Frúutrøð 14, Tórshavn
Kristian Magnussen, Dungagøta 13, Tórshavn
Jan Midjord, Garðsgøta 25B, Argir
Bartal Nolsøe Poulsen Áarvegur 14 Tórshavn
Kári Petersen, Fugloyarvegur 8, Tórshavn
Hendrik Thomsen, Velbastaðvegur 60 Tórshavn
Joan Ziskason, Torkilsgøta 10, Hoyvík



*Á eykauppstillingarfundi hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag fall Helena Dam á Neystabø enn einaferð, og verður hon tí ikki millum valevni Javnaðarfloksins til komandi løgtingsval*

# Menasgreiðingin almenn

FRÁGREIÐING
*Jan Müller*

Tann nógv umrødda Menasfrágreiðingin verður almannakunngjørd í dag. Klokkar 10 verður tíðindafundur á

Parnassinum á Hafnia, har John Christensen, stjóri fyri Menas, fer at leggja fram frágreiðingina: “Kanning av árinunum av eini oljuvinnu í Føroyum”.

Hóast almenningurin higartil bert hevur fingið innlit í part av frágreiðingini, so hevur nógv umrøða verið av hesi kanning. Og herfyri fór tingmaðurin Finnur Helmsdal í tingið við málinum. Hann vil hava landsstýrismannin at svara spurningum um frágreiðingina – og rør framundir, at partar av henni møguliga ikki skulu vera borðbarir.

Tað var BP, sum á sinni setti seg í samband við Fróðskaparsetrið og vildi vita, um tað vórðu verkætlanir, sum tey kundu ynskt sær fóru í gongd í sambandi við eina komandi oljutilgongd. Tá kom uppskot á borðið um eina kanning av m.a. samfelagsligu árinunum av eini oljuvinnu. Endin varð, at BP fíggjaði eina verkætlan, sum Menas kom at standa fyri og har samstarv varð tikið upp við Setrið.



*John Christensen, stjóri í Menas fer at greiða frá kanningini.*

*Mynd Jens K Vang.*

# 62 vilja hava starvsløn

**Mentunargrunnur Landsins hevur fingið tvífalt so nógvar umsóknir um starvsløn í ár í mun til í fjør**

MENTAN
*Turið Kjølbro*

Stórur áhugi er millum fólk, sum vilja arbeiða burturav við síni list. Tað eru umsóknirnar til Mentunargrunn Landsins um starvsløn ein góð ábending um. Ikki færri enn 62 umsóknir eru komnar inn á hesum sinni í mun til 35 í fjør.

- Allar umsóknirnar verða viðgjørdar. Vit kunnu ikki siga um ta einastu einu umsókn, at hon ikki er áhugaverd. Umsóknirnar benda á, at tað eru nógv fólk, sum hava áhugaverdar ætlanir og góð hugskot, og at nógv hendir. Nógv er í gongd og nógv er í umbúna, innan allar listagreinir, sigur Rói Patursson, formaður í Mentunargrunni Landsins.

Tað er nevndin í Mentunargrunninum, sum tekur dagar ímillum umsóknarnir.

- Vit hava ikki neyvar og greiðar treytir til umsóknirnar, men vit seta tær upp út frá lógini og kunngerðini til grunnin. Í fyrsta umfari meta vit út frá tí, sum hevur dygd, sum er innihaldsrík, spennandi og nýskapandi, og sum vit trúgva uppá og hava álit á. Tað vil siga, at tann mest sannførandi umsóknin hevur ein góðan møguleika, sigur Rói Patursson. Hann leggur afturat, at bæði millum umsóknirnar um starvsløn og hinar umsóknirnar eru ógvuliga spennandi ætlanir og nýbrot.

Í fjør vórðu fleiri starvslønir latnar. Ein trý ára starvsløn, tvær eitt ára starvslønir og nakrar seks og tríggjar mánaða starvslønir. Mentunargrunnur Landsins hevur tríggjar miljónir krónur at arbeiða við í ár. Hvør starvslønin er slakar 18.000 krónur um mánaðin. Í lógini fyri grunnin stendur, at helmingurin av játtanini kann nýtast til starvslønir. Tað stendur ongatíð í lógini, hvørjar treytir skulu setast fólki, ið søkja um starvsløn. Heldur ikki verður kravt, at umsøkjararnir leggja fram eitt endaligt úrslit, tá ið starvslønartíðarskeiðið er av.

- Nevndin er samd um, at grunnurin letur sama tal av starvslønum hesuferð. Mentunargrunnurin hevur hálva aðru miljón krónur til tað endamálið, sigur Rói Patursson.

Talið á øðrum umsóknum er eisini hægri í ár enn í fjør. Nevndin hevur júst viðgjørt 25 umsóknir og 25 nýggjar umsóknir liggja klárar til viðgerðar. Talan er um umsóknir um stuðul til útgávur av ymsum slag, konsertir, konsertferðir, verkætlanir og framleiðslu av ymiskum mentunarligum tiltøkum. Til hesar umsóknirnar ræður grunnurin yvir umleið 900.000 krónur í ár og tað er nakað minni enn grunnurin ráddi yvir í fjør.

- Vit hava arbeitt út frá teirri fortreyt, at grunnurin fekk eina økta játtan á hálva miljón krónur í ár, sum lovað varð. Tá ið avtornaði varð játtanin til grunnin tann sama í ár sum í fjør. Hetta er ógvuliga óheppið, men eg vil kortini ikki siga, at tað fer at ganga út yvir nakran. Politikararnir játta pengarnar og vit arbeiða innan fyri teir karmarnar. Samanbera vit Mentunargrunnin vil Dansk Kunstfond átti játtanin at verið tríggjar ferðir so stór.

Nevndin í Mentunargrunni Landsins hevur kortini ikki í hyggju at broyta lutfallið millum starvslønir og aðrar umsóknir. Fyrst í hesum árinum varð funnist at Mentunargrunninum fyri at brúka ov lítlan part av samlaðari játtanini til eitt nú bókaútgávu. Bókaútgevarar søgdu í miðlunum, at orsakað av ov lítlum stuðli frá grunninum til útgávur, komu væl færri bøkur út í fjør, og sama er væntandi í ár og so leingi stuðulin er so sum hann er. Formaðurin í Mentunargrunninum heldur ikki, at myndin er so einføld.

- Vit hava roynt at gjøgnumført ein meiri greiðan politikk, tá ið tað ræður um at stuðla bókaútgávu, soleiðis at vit kunnu síggja, hvat grunnurin í grundini stuðlar. Í tí sambandi hava vit kannað roknskapir frá bókaforløgum fyri at finna út av, hvør kostnaðurin er á eini bókaútgávu, sigur Rói Patursson.

Nevndin í Mentunargrunninum hevur arbeiðsfund eina ferð um vikuna, og um tríggjar vikur verður greitt, hvørji tey hepnu eru, sum fáa starvsløn á hesum sinni.



*- Bæði millum umsóknirnar um starvsløn og hinar umsóknirnar eru ógvuliga spennandi ætlanir og nýbrot, sigur Rói Patursson, formaður í Mentunargrunni Landsins*

# Skótar hugsa um skótavinir

**Hjúnini, Baden Powell, høvud bæði havt føðingardag í dag, 22. februar. Skótar kring heimin halda hendan dagin sum hugsunardag**

HUGSUNARDAGUR
*Eirikur Lindenskov*

Hugsunardagurin er dagurin, tá ið skótar kring heimin allan savnast fyri at minnast hjúnini Baden Powell, ið bæði høvdu føðingardag 22. februar. Á enskum verður hesin dagurin nevndur »Thinking day«, ella »World friendship day«, tí á hesum degi hugsa skótar um skótavinir okkara kring heimin.

Í Føroyum gongur talvan í kirkjunum til frama fyri eitt vælgerandi endamál. Í ár gongur talvan fyri neyðrakt í Afganistan.

Í Havn verður farið í kirkju kl 19, har Bjarni Bæk, dómpróstur, heldur gudstænastuna.



# Tað verður tungt at lyfta arvin eftir Karl




*–Tað er ikki loysnin at fara í verkfall í heilum. Tað man vera ein royndur lutur, at tað kemst longst við samráðingum.Men tað skal heldur ikki misfatast soleiðis, at nýggi formaðurin fer at lata sær alt lynda, sigur Jan Midjord, ið hevur tikið við sum formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag eftir Karl Johansen*

*Mynd: Jens K. Vang*

**– Eg fari at føra arbeiðið hjá Karl Johansen víðari, sigur Jan Midjord, sum er blivin formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag eftir at Karl Johansen brádliga doyði í farnu viku**

FORMANSSKIFTI
*Áki Bertholdsen*

– Tað verður ikki lætt at lyfta arvin eftir Karl Johansen.

Tað viðgongur Jan Midjord, nýggjur formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hann hevur nú tikið við sum formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag eftir Karl Johansen, sum brádliga doyði í farnu viku.

Hann var næstformaður í Havnar Arbeiðsmannafelag og nú formaðurin legði árarnar inn, tekur hann við sum formaður.

Hóast Jan Midjord ikki hevur verið so nógv frammi í fakfelagshøpi, er hann ongin ársungi í fakfelagspolitikki, og tað er ikki ein heilt óroyndur maður, sum nú tekur við starvinum sum formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hann hevur verið í nevndini í Havnar Arbeiðsmannafelag í útvið 10 ár og hetta er onnur seta hansara sum næstformaður, hvør seta er tvey ár.

## Hóvlig linja

Tey, sum kenna hann úr nevndini í Havnar Arbeiðsmannafelag bera honum tað, at hann er ein dámligur maður, siðiligur og hóvligur.

Karl Johansen var ikki ein fakfelagsformaður, sum var kendur fyri at fara í verkfall, hvørja ferð høvið beyðst.

Og tað skulu vit heldur ikki væntað, fer at eyðkenna nýggja formannin.

Hann sigur, at hann fer at leggja somu hovligu linjuna, sum Karl Johansen legði.

– Tað er ikki loysnin at fara í verkfall í heilum. Verkfalsvápnið skal brúkast við størsta varsemi og tað man vera ein royndur lutur, at tað kemst longst við samráðingum.

Men tað skal heldur ikki misfatast soleiðis, at nýggi formaðurin fer at lata sær alt lynda.

– Sjálvandi skulu vit krevja okkara rætt og sjálvsagt skulu vit hava tær sømdir, vit halda okkum eiga. Arbeiðsgevarin letur onki frá sær góðvilliga . Og stendur á, eiga vit heldur ikki at aftra okkum við at brúka verkfalsvápnið, sigur Jan Midjord.

Annars fer at hann at føra arbeiðið eftir somu kós, sum Karl Johansen legði.

– Tað er ein stór ábyrgd at vera formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, ikki bara fakfelagspolitiskt, men eisini tí at felagið umsitur stórar ognir og mógvan pening. Tí ræður um at stíga varliga og ikki at leypa framav, sigur hann.

## Viðbøturnar upp

Karl Johansen segði við Sosialin beint fyri nýggjár, at tyngsta takið hjá Havnar Arbeiðsmannafelag í hesum árinum verður at fáa viðbøturnar fyri ymisk arbeiði, upp.

Og tað er nýggi formaðurin púra samdur um.

– Nógv tað mesta arbeiði eru blivin serarbeiði. Men viðbøturnar vit fáa fyri ymisk serarbeiði, sum t.d. at koyra stórar trukkar, kranar og annað, er heilt afturútsigld og tað verður størsta uppgávan hjá okkum at fáa viðbøturnar upp.

Og tá ið hann sigur upp, meinar hann munandi upp.

Men Jan Midjord er eisini greiður yvir, at tað verður eitt tungt hoyggj at draga. Men tað skal dragast.

– Viðbøturnar fyri ymisk arbeiði eru bara nakrar heilt fár krónur, men tær skulu heilt munandi upp,sigur hann, uttan at hann tó vil seta tal á.

Hann sigur, at Havnar Arbeiðsmannafelag júst hevur vent sær onnur fakfeløg um at fara undir samráðingar við arbeiðsgevaran í felag um viðbøturnar.

Hann sigur, at enn veit hann ikki, hvørji fakfeløg verða við, men talan kann verða um Havnar Arbeiðskvinnufelag, arbeiðarafeløgini í Klaksvík og Føroya Arbeiðarafelag- og tilsamans eru øll arbeiðsfólk í landinum limir í onkrum av teimum feløgunum.

Men at Havnar Arbeiðsmannafelag í hvussu so er fer undir hesar samráðingarnar er ongin ivi, tí tá í sáttmálasamráðingar vóru seinast, varð skrivlig semja gjørd við arbeiðsgevararnar um at fara undir slíkar samráðingar í ár.

Hvussu langa framtíð, Jan Midjord hevur í Havnar Arbeiðsmannafelag, er tað ongin sum veit enn. Sjálvur hevur hann ongar tankar gjørt sær um at bjóða seg fram sum formansvalevni, tá ið val verður aftur.

– Eg havi bara verið formaður í nakrar dagaro g slíkar spurningar havi eg als ikki hugsa um enn.

Eitt annað er so tað, at óvist er, nær formansval verður aftur. Í løtuni verða lógirnar fyri Havnar Arbeiðsmannafelag tráðlisnar fyri at vita, hvussu rætta mannagongdin er í hesum føri, um formaðurin veðrur sitandi til regluligi aðalfundurin verður aftur, ella um kallast skal til eykaaðalfund at velja nýggjan formann.

Jan Midjord er 48 ára gamal, slektaður av Økrum, men flutti til Havnar síðst í sekstiárunum. Síðani hevur hann m.a. arbeitt hjá Farodane, hjá glasvirkinum hjá Finni Olsen og í hjá Strandferðsluni í 24 ár. Fyri trimum árum síðani fór hann aftur í starv hjá Farodane, har hann nú arbeiðir.




Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar

hósdag til sunnudag ella fríggjadag til mánadag
21/02 - 25/02, 25/02 - 4/03 og 07/03 - 11/03

Unna tær eina fríløtu í Keypmannahavn. Eitt vikuskifti har tú tekur tær av løttum, spákar ein túr á "Stroynum" ella fært tær ein góðan bita í Nýhavnini.

**Íroknað er** flogferð, ferðaavgjøld og innivist á Hotel Du Nord í 3 nætur við morgunmati.

Fráferð úr Vágum hósdag ella fríggjadag. Fráferð úr Keypmannahavn sunnudag ella mánadag.

3.325,-
Prísur fyri hvønn í dupultkamari

4.090,-
Prísur fyri hvønn í einkultkamari

**Hotel Du Nord**
Hotel Du Nord liggur mitt í Keypmannahavn, 110 m frá Høvuðsjarnbreytastøðini, og tætt við Ráðhúsplássið, Strøget, Tivoli.

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

SANSIR · TEL 355 355